# Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið

Dagfesting: 31-05-2023

**Uppskot til**

## Kunngerð um broyting í kunngerð um at skipa fiskiskapin eftir norðhavssild við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2023

(Dagførdar kvotunøgdir, flyting av kvotu millum ár o.a.)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 165 frá 20. desember 2022 um at skipa fiskiskapin eftir norðhavssild við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2023 verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 2 verður "50.000 tons" broytt til: "112.713 tons".

**2.** Í § 2 verður sum stk. 2 sett:
"*Stk. 2.* Afturat kvotuni í stk. 1 verða 2.600 tons av norðhavssild, ið ikki vórðu fiskað í 2022, flutt til at verða fiskað í 2023."

**3.** Í § 3, stk. 1 verður "35.000 tons" broytt til: "100.313 tons".

**4.** Í § 3, stk. 2 verður "29.450 tons" broytt til: "87.011 tons".

**5.** Í § 4, stk. 1 verður "21.769 tons" broytt til: "67.219 tons".

**6.** Í § 5, stk. 1 verður "1.588 tons" broytt til: "4.904 tons".

**7.** Í § 7, stk. 1 verður "1.300 tons" broytt til: "3.000 tons".

**8.** Í § 7, stk. 1 verður "samsvarandi § 14" broytt til: "samsvarandi § 13".

**9.** Í § 8, stk. 1 verður "1.731 tons" broytt til: "5.482 tons".

**10.** Í § 8, stk. 1 verður "8 ára" strikað.

**11.** Í § 8 verður sum stk. 2 og 3 sett:
"*Stk. 2.* Eigari av ávísum fiskifari við kvotu av nøgdini í stk. 1, har gildistíðarskeiðið er runnið, og kvotan er útlutað sum egin árskvota, kann sambært § 34, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslógini flyta kvotu, sum ikki er fiskað í 2023 til 2024, tó í mesta lagi eina nøgd, ið samsvarar við 10% av egnu árskvotuni í 2023.
*Stk. 3.* Eigari av fiskifari við kvotu av nøgdini í stk. 1, har gildistíðarskeiðið er runnið, og kvotan er útlutað sum egin árskvota, kann sambært § 34, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslógini fiska upp um egnu árskvotuna í 2023, tó í mesta lagi eina nøgd, ið samsvarar við 10% av egnu árskvotuni í 2023. Ov nógv fiskað í 2023 verður sambært § 34, stk. 4, 2. pkt. í løgtingslógini mótroknað av egnari árskvotu í 2024."

**12.** Í § 9, stk. 1, 1. pkt. verður "4.250 tons" broytt til: "9.802 tons".

**13.** Í § 9, stk. 1, 3. pkt. verður "4.250 tonsini" broytt til: "9.802 tonsini".

**14.** Í § 9 verður sum stk. 4 sett inn:
“*Stk. 4.* Eigari av ávísum fiskifari, sum hevur kvotu av nøgdini í stk. 1, og sum er løgd um til egna árskvotu, kann sambært § 34, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslógini flyta kvotu, sum ikki er fiskað í 2022 til 2023, tó í mesta lagi eina nøgd, ið samsvarar við 10% av egnu árskvotunum í 2022.”

**15.** Í § 10, stk. 1 verður “4.362 tons” broytt til: “9.406 tons”.

**16.** Í § 10 verður sum stk. 2-4 sett:
“*Stk. 2.* Eigari av ávísum fiskifari, sum hevur kvotu av nøgdini í stk. 1, og sum er løgd um til egna árskvotu sambært § 49, stk. 4 í løgtingslógini, kann sambært § 34, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslógini flyta kvotu, sum ikki er fiskað í 2022 til 2023, tó í mesta lagi eina nøgd, ið samsvarar við 10% av egnu árskvotuni í 2022.
*Stk. 3.* Eigari av ávísum fiskifari, sum hevur kvotu av nøgdini í stk. 1, og sum er løgd um til egna árskvotu sambært § 49, stk. 4 í løgtingslógini, kann sambært § 34, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslógini flyta kvotu, sum ikki er fiskað í 2023 til 2024, tó í mesta lagi eina nøgd, ið samsvarar við 10% av egnu árskvotuni í 2023.
*Stk. 4.* Eigari av ávísum fiskifari, sum hevur kvotu av nøgdini í stk. 1, og sum er løgd um til egna árskvotu sambært § 49, stk. 4 í løgtingslógini, kann sambært § 34, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslógini fiska upp um egnu árskvotuna í 2023, tó í mesta lagi eina nøgd, ið samsvarar við 10% av egnu árskvotuni í 2023. Ov nógv fiskað í 2023 verður sambært § 34, stk. 4, 2. pkt. í løgtingslógini mótroknað av egnari árskvotu í 2024.”

**17.** Í § 11 verður “sambært § 8” broytt til: “sambært § 7”.

**18.** Aftan á § 11, men áðrenn yvirskriftina yvir § 12, verður sett:

“**§ 11 a**. Av kvotuni sambært § 3, stk. 1 verða 500 tons sett av til at nýta sum hjáveiða í fiskiskapi hjá føroyskum skipum eftir uppsjóvarfiski í føroyskum sjógvi.”

**19.** Í § 13, stk. 2 verður “02. juni 2023, kl. 16.00” broytt til: “dd. mm. 2023, kl. 16.00”.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, xx. juni 2023

**Dennis Holm**
landsstýrismaður

/ Elin Mortensen